# Eldsbruni í Kvívík

**Mánadagin seinnapartin kom eldur í eini eldri hús í Kvívík. Eldur var í takinum, men sløkkiliðið fekk beinanvegin tamarhald á eldinum**

ELDSBRUNI
*Stefan í Skorini*

Mánadagin vóru menn í holtur við at skifta takið á einum eldri húsum, sum standa niðalaga í bygdini.

Tá nýggja takið verður lagt á, skal tjørupapp brennast á skoytini í takplátunum. Tað er av hesum, at eldur er komin í tekjuna.

Ivan Klein Olsen, sýslumaður í Vestmanna, upplýsir, at eldur er komin í bjálvingina millum skins og hold. Bjálvingin er flamingo, og hetta evnið er sera eldfimt. Hetta slagið av bjálving verður tí ikki nýtt longur.

Eldurin varð fráboðaður klokkan 16.40, og hálvan tíma seinni var alt liðugt. Kvívíkar kommuna hevur eitt sløkkilið og ein sløkkibil, og hesi vóru á staðnum. Tað er kanska ikki á hvørjum degi, at Kvívíkar sløkkilið hevur útrend.

Lítil skaði stóðst av eldsbrunanum. Nakað av vatnskaða stóðst og eitt sindur av roykskaða, men annars ikki nakað álvarsamt.




*Eldur var í einum húsum í Kvívík mánadagin. Sløkkiliðið var beinanvegin á staðnum og basti eldinum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, seinnapartin andøvsgul av útnyrðingi. Sólglottar, men kanska okkurt ælið fyrrapartin og hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av útnyrðingi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Upp í hvassan vind av landsynningi og regn og hitin um 13 stig. Sunnudagin stívt andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin um 8 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 15 |
| Nuuk | 11 |
| Qaqortoq | 12 |
| Ammassalik | 10 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 19 |
| Tromsø | 16 |
| Bergen | 11 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 15 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 13 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 28 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 30 |
| Róm | – |
| Malorca | 32 |
| Athen | 31 |
| Malta | 31 |
| Tunis | 34 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 30 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 31 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 15 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 996 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani fór um Føroyar mikudagin.




Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer í landsynning og grynnist og ein hátrýstryggur vestan fyri Ísland verður væntandi yvir Føroyum fríggjadagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 27/08 kl. $06^{00}$– 28/08 kl. $06^{00}$. Hitin í gjár: 11,1°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 27/08 kl. $06^{00}$– 28/08 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í aug.: 127,3 mm

**HAVHESTAGLÚPAR**
Vit hava alt tilfar til Glúpar so sum:
Rustfrítt teinastál net og bambusstengur



VIT SENDA UM ALT LANDIÐ
VHS Alt tilfar til
VATN HITAVERK SANITET VENTILATIÓN
Svend Krosstein

## VESTFALLSKYRRINDI

25. august: Fyrra kvarter
1. september: Mánin longst frá jørðini
2. september: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2001

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 29. aug | 04.14 | 16.39 | 03.14 | 15.39 | 03.29 | 15.54 | 06.14 | 18.39 | 07.14 | 19.39 | 02.29 | 14.54 | 01.29 | 13.54 | 04.29 | 16.54 | 05.29 | 17.54 | 03.59 | 16.24 | 05.14 | 17.39 |
| 30. aug | 05.04 | 17.28 | 04.04 | 16.28 | 04.19 | 16.43 | 07.04 | 19.28 | 08.04 | 20.28 | 03.19 | 15.43 | 02.19 | 14.43 | 05.19 | 17.43 | 06.19 | 18.43 | 04.49 | 17.13 | 06.04 | 18.28 |
| 31. aug | 05.52 | 18.15 | 04.52 | 17.15 | 05.07 | 17.30 | 07.52 | 20.15 | 08.52 | 21.15 | 04.07 | 16.30 | 03.07 | 15.30 | 06.07 | 18.30 | 07.07 | 19.30 | 05.37 | 18.00 | 06.52 | 19.15 |
| 1. sep | 06.38 | 19.00 | 05.38 | 18.00 | 05.53 | 18.15 | 08.38 | 21.00 | 09.38 | 22.00 | 04.53 | 17.15 | 03.53 | 16.15 | 06.53 | 19.15 | 07.53 | 20.15 | 06.23 | 18.45 | 07.38 | 20.00 |

…hvør sigur at vit eru sum onnur?
HESTPRENT
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo